## DAGSINS MEINING

# Neyðug orkuráðstevna

Ráðstevnan "Offshore Faroes" í Norðurlandahúsinum nú um dagarnar varð bæði neyðug og góð. Umframt at seta fokus á sjálva oljuleitingina við Føroyar, har tíbetri fleiri glottar hómast í havsbrúnni, so høvdu stigtakararnir eisini valt at umrøða orkuspurningin sum heild.

Nú kann við fyrsta eygnakast sigast, at hóast hesi málini ikki heilt hoyra saman, so eru tey partur av somu søk: hvussu vit í framtíðini kunnu nøkta vaksandi orkutørvin. Og her kemur komandi oljuleitingin eisini inn í myndina. Vit eru nevniliga so nógv bundin at oju sum orkukeldu, at stór oljufund á okkara landgrunni kunnu vera við til at venda óhepnu gongdini. Eini gongd, har vit við verandi og komandi høgu oljuprísunum verða uppaftur bundin at innfluttu oljuni. Finna vit okkara egnu olju kemur hon sjálvandi at skapa størri javnvág í roknskapinum, tvs. at vit tá hava eina nýggja inntøkukeldu, sum kann byrgja upp fyri høgu oljuprísunum, sum í løtuni tyngja búskapin alt meira.

Hin parturin av orkuveitingini, viðvarandi orkukeldur so sum vind- og alduorka er hin stóra avbjóðingin. Vit hava brúk fyri at menna slíkar orkukeldur, antin vit finna olju ella ikki. Og her hava vit longu sett skjøtil á, hóast tað eru tey, sum halda, at tað hevur gingið alt ov seint. Nú er at hyggja frameftir og taka viðvarandi orkukeldur í størsta álvara.

Tað er at vóna, at slík ráðstevna kann gera okkum meira medvitandi um ta álvarsligu støðu, sum samfelag okkara er í, tá orkuveiting umræður. Føroyar liggja fremst í øllum heiminum, tá tað snýr seg um at vera bundin at olju. Umleið 94% av allari orkunýtsluni stava frá olju. Tá eru skipini íroknað.

Tí er boðskapurin frá olju- og orkuráðstevnuni greiður: latið okkum finna oljuna og samtíðis eisini menna viðvarandi orkukeldurnar. Tú kanst eisini siga tað soleiðis: finna vit olju so hava vit eisini uppaftur betur ráð til at menna viðvarandi orkukeldur, tvs. at vit her kunnu sláa tvær flugur við eitt. Hví ikki leggja okkum á odda her eisini, nevniliga tá vit hava funnið oljuna at brúka part av teimum inntøkunum til at gera Føroyar til staðið, har viðvarandi orkukeldur fáa hægstu raðfesting.

Hvussu enn gongst við oljuleitingini, so hava vit veruliga brúk fyri at skunda undir útbygging av viðvarandi orkukeldum. Finst eingin olja, so er hetta ikki bert neyðugt, tá verður tað ein avgerandi treyt, skal hesum samfelagnum verða lív lagað við støðugt vaksandi oljuprísunum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Kanska best, at øll humlan verður skift út



BEATE L. SAMUELSEN
Limur í umboðsnevndini hjá Sev

**Fólk eru troytt av rokinum, sum altíð er um Sev. Tey vilja bara sleppa at tendra og sløkkja kontaktina – og so skelda, tá streymurin fer**

At ósemjan, sum hevur tikið seg upp í Sev-leiðsluni, hevur breitt seg til antin at halda við meirilutanum í Stýrinum um at koyra stjóran fyri Sev frá ella fara í parti við minnilutanum og lata mannin varðveita starv sítt, hevur fingið slíkar dimensiónir, sum vit neyvan høvdu ímyndað okkum, nú fyrsta árið hjá hesum Stýrinum er um at fara aftur um bak.

Longu tá stríðið í februar í fjør um at um manna Stýrið kom til sjóndar, sást hvørjar kreftir lógu framvið í Sev.

Hættirnar, ið brúktir vóru av meirilutanum í kommununi í Suðurstreymoy, vóru ikki serliga tiltalandi fyri aðrar nývaldar limir í øðrum kommunum, sum ongan hug høvdu at vera drigin uppá tráð í einum slíkum stríði. Nógv vóru nývald og hildu, at soleiðis plagdi tað at vera.

Úrslitið síggja vit í dag, har ikki bara meirlutin í Stýrinum hevur givið stjóranum í Sev, Klæmint Weihe sekkin, men eisini hevur givið Stýrisformanninum, Leivi Hansen, eitt gypp í afturpartin.

Tá hann ikki tók undir við ætlan meirilutans, har ein partur eru hansara egnu partamenn, var hann skiftur út við Kim Durhuus.

**Skriðan leyp**

Tað skilst, at ætlanin hjá Stýrinum var at halda uppsøgnina av Klæminti Weihe loyniliga so leingi, sum til bar, men eftirsum skjótt lak út, hvør ætlanin hjá meirilutanum var, leyp skriðan.

Einki var tí meiri natúrligt enn at heita á formannin fyri umboðsnevndina hjá Sev, Hans Tausen Olsen, um at kalla til eykafund í umboðsnevndini við stytst møguligari freist fyri at fáa eina frágreiðing um tað, sum hent er og møguliga at fáa broytt ymiskt fyri at fáa viðurskiftini rætt lag aftur.

Tá minnilutin heitti á umboðsnevndarlimir í ymsum pørtum av landinum um at taka undir við hesi áheitan fyri at fáa kravdu undirtøkuna fyri einum slíkum eykafundi, tóku vit, sum umboða Sambandsflokkin í Suðurstreymoy, undir við áheitanini.

**Rokið tað bera humbug**

Men at taka undir við eini áheitan um eykafund og so at skula tryggja ávísum persónum sess í Stýrinum einaferð aftrat, eru hvør sítt mál, sum spurnartekin kann setast við.

Sambandsflokkurin í Suðurstreymoy skyldar ikki Tjóðveldisflokkinum nakað sum helst, og áðrenn ein sólarklár frágreiðing á eyka umboðsnevndarfundinum er fingin til vega hesum viðvíkjandi, kann alt henda.

Ein viðkomandi spurningur er, um ikki øll humlan í Stýrinum skal skiftast út, og nýggj fólk veljast í staðin, so friður kann valda á stovninum, sum eitur Sev. Ella ein partur av Stýrinum.

Ongantíð hevur heitið á bókini hjá Søren Kierkegaard "Antin Ella", sum Ólavur Rasmussen gav út beint undan jólan, verið meiri aktuelt enn í júst hesum stríðnum.

Fyri vanlig fólk, sum ikki kenna annað til Sev enn at sløkkja og tendra og skelda, tá streymurin fer, er alt rokið í Sev tað bera humbug.

Tíðin tykist vera farin frá tí gomlu uppbygging av stovninum, sum eitur Sev, hóast tað eru kommunurnar sum eiga hann.

Tíðin er kanska eisini longu farin frá seinast samtyktu broytingini í starvsskipanina fyri umboðsnevndina hjá Sev, sum er lítið eldri enn hetta valda Stýrið.

*beate@post.olivant.fo*

# Ov nógvir negativir journarlistar

BEINTA BERGSDÓTTIR

Haldi, at vit hava fleiri journarlistar her í Føroyum! Vit hava nakrar, ið eru góðir, sum duga avbæra væl. Men so eru tað nakrir, ið virkuliga skuldi tikið seg saman! Haldi, at journarlistanir meira kundu tonkt upp á tað positiva og ikki altíð fokusera upp á tað negativa! Nú ein dagin kundi Norrøna ikki leggja at fyrrenn umleið kl.15, tað vil siga 9 timar ov seint vegna veður. Ein journarlistur snakkaði við nøkur fólk umborð. Hann spurdi onkran, um tað ikki var keðiligt, at næstan allur dagurin var spiltur burtur o.s.fr... men fólkin høvdu tað so deiligt umborð!

Hví kundi hann ikki havt spurt, um tað ikki var deiligt at hava frí ein dag afturat...? Hví skal ein bara spyrja um tað negativa og ikki eisini tað positiva? Onkur sigur, at tað negativa selur betur, men heilt ærligt... ein kann eisini stýra sær!

Tað er meiri enn so, tá ein hoyrir útvarp ella sær sjónvarp, har tvey kjakast um eitthvørt evni, at journarlisturin heldur við einum av teimum, og tað bæði hoyrir og sær ein væl! Og so eru tað tveir ímóti einum. Hvussu sær man tað? Jú, t. d. gevur journarlisturin einum minni tíð at siga, hvat hann meinar, og so verður tað eisini lagt press niður á tann eina persónin!

Journarlistar í Danmark eru vanliga meiri vinarligir, smílandi og royna at fáa okkurt positivt burturúr kjakinum! Haldi veruliga, at summir føroyskir journalistar hava nógv at læra... Haldi annars, at tað eru fleiri áhugaverdar sendingar bæði í útvarpinum og í sjónvarpinum.

*beinta_bergsdottir@hotmail.com*

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.